## søkir eftir einum skrivstovufólki

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**
– At hava um hendi stovnsins skrivstovuarbeiði. Tað verður seg bókhald, lønir, flytingar, brævskriving, ymiskar skrásetingar og arkiveringar; eitt nú post, hagtøl, góðskumappur og eftirmetingar, og annað.

**Arbeiðstað**
Skrivstovan í Smiðjugerði, har nýtt virksemi teimum arbeiðstarnaðu at frama, er undir uppbyggjan.

**Førleikakrøv:**
- Viðkomandi útbúgving og skrivstovuroyndir
- Duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir

Bókhaldi verður ført í Lundanum. Lønir verða fluttar við Com-Data skipanini og flytingar avgreiddar um heimagreiðslu.

**Vit bjóða:**
- Spennandi uppbyggingar arbeiði, við atliti til at góðskustýra
- Møguleika fyri skiftandi arbeiðstíðum

**Løn og setanartreytir:**
- Starvið verður sett við beinleiðis tilvísing til fyristøðufólki
- Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.
- Starvið verður at seta 1. august 2002, ella sjóktast tilber.

Meira fæst at vita um starvi við at venda sær til Kristinu Larsen, fyristøðufólk á tlf. 211135.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 24. mai 2002.**

Umsókn saman við prógvið, royndarváttan v.m skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Smiðjugerð 6, kj
Postboks 301
110 Tórshavn

**Viðmerk á brævbjálvan:**
**»umsókn skrivstovufólk«**

## Lærlingur til fløgudeildina

Vit sóknast eftir einum lærlingi til fløgudeild okkara at byrja sum skjótast. Tú kemur m.a. at arbeiða innan tónleik, Playstation, telduspøl, X-Box, Nintendo o.s.fr. í einum spennandi umhvørvi, har nógv ferð er á gerandisdegnum.



Vit vænta, at tú ert løtt/lættur í lyndi, ágrýtin, smílandi og fyrikomandi. Hevur tú telduførleika, er tað ein fyrimunur.

Lærutíðin er 3 ár og ein treyt er, at tú hevur FHS-prógv el. líkn. Í lærutíðini verður tú send/ur niður á 14 daga skeið/skúla 2-3 ferðir.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum dynamiskum liði. Umframt fløgudeildina hevur 3-arin eina fotodeild og eina deild við prýðislutum. Tilsamans starvast uml. 12 fólk í 3-aranum, undir leiðslu av okkara stjóra Høgna Zachariasen.

Vilt tú hava meiri at vita um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Høgna, tel 353530.

Skrivlig umsókn verur at senda sum skjótast til:

3arin

*att. Høgni Zachariassen*
*SMS · Postboks 1057 · FO-110 Tórshavn*

## Kvívíkar skúli

### søkir eftir lærara til skúlaárið 2002/2003

Vegna lærara í farloyvi, er eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar skúla, skúlaárið 2002/2003.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið serliga kann undirvísa í tónleiki, svimjing/fimleik og annars øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar skúli er ein fýraflokkaður skúli við næming-um frá 1. til 7. árgang. Næmingatalið komandi ár er 51. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er væl útgjørdur við fimleikarhøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meir fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heinesen, tlf. 421291 fartlf. 211504.

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúlastýrið í seinasta lagi 31. mai 2002 kl. 12.00.

**Skúlastýrið fyri Kvívíkar skúla**
Att: Jan Andreasen
340 Kvívík

## Haldórsvíkar Skúli og Hvalvíkar Skúli

Søkt verður eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv uml. 24 t/v (14 t/v í Haldórsvíkar Skúla og 10 t/v í Hvalvíkar Skúla) skúlaárið 2002/2003.

Tað er ein fyrimunur, at tann, ið settur verður, kann undirvísa í handarbeiði, heimkunnleika og ítrótti.

Starvið er lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast frá skúlaleiðarunum, tlf. 423159 og tlf. 422116.

Møguligar umsóknir skulu vera øðrum skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 3. juni 2002.

**Skúlastýrið fyri Haldórsvíkar Skúla**
v/ Martin Hansen
438 Langasandur

**Skúlastýrið fyri Hvalvíkar Skúla**
v/ Gunnar Joensen
430 Hvalvík

## Hósvíkar Skúli

Søkt verður eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv at lesa uml. 23 tímar um vikuna skúlaárið 2002/2003.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 422259 ella 422526.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi hin 28. mai 2002.

**Skúlastýrið fyri Hósvíkar Skúla**
v/ Adolf Johannessen
420 Hósvík

## Handilslærlingur

**Hevur tú hug at royna teg?**

Vit søkja eftir fólki til handil okkara, arbeiðsuppgávurnar koma at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring, bílegging av vørum og egin ábyrgd av starvsøki, umframt aðrar uppgávur.

Væntað verður at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert fyrikomandi, við til uppsøkjandi uppgávur, nógva orku og áræði, ert opin og ikki bangin fyri avbjóðingum. Dentur verður lagdur á at tú hevur hug til at veita viðskiftafólki eina góða tænastu og ert ábyrgdarfullur.

Fyrimunur um tú hevur teldukunnleika og áhuga/kunnleika til motorar og maskinur - *ert kreativur.*

Skrivlig umsókn ynskist til 1. juni 2002

*Handilsfyritøkan Kaj Andreasen & Co. varð stovnað í Tórshavn í 1970. Fyritøkan útvegar maskinur og útgerð til byggivinnuna, og útgerð til fiski- alivinnuna, skip og bátar*

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Postboks 1200 · 110 Tórshavn

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Fólk søkist

Søkt verður eftir einum formanni og trimum arbeiðsmonnum til jørðarbeiði á Skálafjørðinum.

**Sp/f J. K. H. Entreprenør**
tlf. 227255



## søkir eftir fólkum til eindina »Vinnuskeið«

**Einum fólki til »kopitænastuna«**
**Vit síggja fegin at tú kanst**
– Handfara ymisk tól í samband við okkara »kopitænastu«. Eitt nú teldu, kopimaskinu, v.m. Tænastan vit koma at bjóða fram er t.d. at teksta, seta upp, reinskriva, kopiera, laminera, spiralinnbinda, skera v.m.

**Einum fólki til »køkin«**
**Vit síggja fegin at tú kanst**
– Tilgerða mat í samband við okkara »Matgerðartænastu«. Tænastan vit koma at bjóða fram er t.d. at lata ábit út av húsinum, ella at matgera í samband við skeiðvirksemi.

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**
- At finna áhuga og førleika hjá tí arbeiðstarnaða. At menna, upplæra og geva arbeiðstarnaðum vinnuligar royndir sum eru at javnmetast við vanlig arbeiðskor.
- At verða við til at byggja upp arbeiði á deildini. Talan kann vera um at arbeiða á øðrum eindum.

**Førleikakrøv**
- Viðkomandi útbúgving
- Evnir at læra av sær
- Evnir at samstarva, eisini við aðrar fakbólkar
- Dugur at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- Ert hugskotsfullur, kreaktivur og positivur

**Vit bjóða**
- Spennandi uppbyggingar arbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan
- Skeið møguleikar

**Løn og setanartreytir**
- Starvið hevur tilvísing til deildarleiðan
- Løn sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið
- Størvini verða at seta 1. august 2002, ella sjóktast tilber

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Kristinu Larsen, fyristøðufólk á tlf. 211135.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 24. mai 2002**
Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Smiðjugerð 6, kj
Postboks 301
110 Tórshavn **brævbjálvin skal viðmerkjast »umsókn vinnuskeið«**

**»Vinnuskeið«**
*Endamáli við hesi eindini, er at royna arbeiðsevnini hjá tí arbeiðstarnaða, fyri at meta um arbeiðsmøguleikan. At skipa fyri arbeiðsvenjing, við atliti til, at tann arbeiðstarnaði fær arbeiði ella kemur undir útbúgving.*

Toll- og Skattstova Føroya

## Størv sum grannskoðarar

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skudarinnkreving hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Streymoyar øki starvast 60 fólk. Høvuðsskrivstovan, har viðkomandi koma at starvast, er á Smyrilsvegi, Posttollurin heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

*Heimasíða:*
*www.tollskatt.fo*

*E-mail:*
*streymoy@tollskatt.fo*

V

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, eru trý størv leys at søkja til setan so skjótt til ber. Eitt fast starv fulla tíð, eitt fast starv hálva tíð og eitt starv sum avloysari í 1 ár fulla tíð.

Øll størvini eru á Eftirlits- og innheintingardeildini. Høvuðsuppgávurnar eru eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt og toll, herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv**
Tey, sum sett verða í fulltíðarstørvini, skulu hava roknskaparligan førleika, so sum cand. merc., HA, HD ella líknandi útbúgving.

Tann, sum settur verður í hálvtíðarstarvið skal hava roknskaparligan førleika, so sum merkonom ella líknandi útbúgving.

Harumframt skulu nýggju fólkini vera fyrikomandi og arbeiðssom og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v. ø. o. trý sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum er treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar øki, men fevnir annars um Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí, og tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Hallbjørg Hansen á tlf. 310260, lok. 108.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**22. mai 2002**

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

Føroya Lærarafelag

## Kunngerð

### frá Føroya Lærarafelag

Útsetti aðalfundurin hjá Føroya Lærarafelag og StuðulsHeilgrunni Lima Føroya Lærarafelags verður

**8. juni 2002 kl. 10.00**

í høllini á Føroya Læraraskúla.

## Húsa/Syðradals skúli

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv (umleið 17 tímar) skúlaárið 2002/2003.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 04. juni 2002.

**Skúlastýrið fyri Húsa/Syðradals skúla**
v/ Elin Syderbø
796 Húsar

## Skála skúli

Søkt verður eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv (umleið 13 tímar) skúlaárið 2002/2003.

Starvið er lønt sambart avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar fáast frá skúlaleiðaranum, tlf. 442118 ella 211360.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 3. juni 2002.

**Skúlastýrið fyri Skála skúla**
v/ Rosu Prestá
480 Skáli